# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*Fólk eiga at hugsa seg um, tá tey flúgva í Russlandi*

*Talsmaður hjá norskum flogstarvsfólkum*

# Kanska vóru tað bremsurnar sum sviku



*Russiska flogfarið fór í fleiri petti, tá tað rendi á ein betongvegg og eini hús*
*Mynd: Reuters*

**Lendingarbreytin var vát og sýnið vánaligt, tá flogfarið gleið av breytini í Irkutsk og rendi á eini hús**

**FLOGVANLUKKA**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

204 fólk vóru í flogfarinum, sum í gjár royndi at seta seg á flogvølllinum í russiska býnum Irkutsk. Í gjár høvdu bjargingarliðini funnið 124 deyð, teirra millum fleiri skúlabørn, sum skuldu halda summarfrí við Baikal-vatnið har eysturi í Russlandi.

Tað regnaði illa í Irkutsk, og sýnið var vánaligt, tá Airbus-flogfarið setti seg, men av einari ella aðrari orsøk fór flogfarið á glið og út av lendingarbreytini. Har rendi tað fyrst á ein betongvegg og síðani á eini hús. Eldur kom í flogfarið beinanvegin, og tað tók sløkkiliðnum tríggjar tímar at basa honum.

Innanríkisráðið í Moskva kunngjørdi í morgun, at sambært fyribilskanningum sviku bremsurnar, tá flogfarið hevði sett seg. Bremsubrekið gjørdi, at aðrar skipanir virkaðu heldur ikki, og tí fór flogfarið útav, segði ein talsmaður hjá innanríkisráðnum við AFP.

Hetta er onnur vanlukkan á flogvøllinum í Irkutsk seinastu fimm árini. Í 2001 doyðu øll tey 145 fólkini, tá eitt flogfar fór útav, júst sum tað hevði sett seg har.

Ein talsmaður hjá flogstarvsfólkunum í Noregi sigur við Dagsavisen, at fólk eiga at hugsa seg um, ætla tey at flúgva við russiskum flogfeløgum. Tey seinastu árini hava feløgini fingið sær Boeing- og Airbus-flogfør, men tað eru framvegis tey, sum brúka flogfør av slagnum Tupolev. Hesi eru gomul, og fólk eiga ikki at ferðast við teimum, sigur talsmaðurin hjá norsku flogstarvsfólkunum, sum leggur aftruat, at fólk eiga at brúka flogfeløg, sum hava verið virkin leingi, tí tað borgar fyri, at feløgini hava trygdina í lagi, sigur hann.

# Lívshættisligt at hava skeivt navn

**Shiamuslimsk harkalið seta vegbyrgingar upp í Bagdad, og fólk, sum hava sunnimuslimsk nøvn, verða tikin til viks og skotin**

**IRAK**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Lógloysi ræður í irakska høvuðsstaðnum. Vápnaðir shiamuslimskir bólkar seta vegbyrgingar upp ymsastaðni í býnum. Menninir eru ofta í løgreglu-. ella hermannabúna, og teir steðga øllum, sum koma framvið. Tey, sum hava shiamuslimsk nøvn, sleppa at halda leiðina fram, meðan fólk við sunnimuslimskum nøvnum verða tikin til viks og síðani skotin, sigur BBC.

– Vápnaðir shiamuslimar drepa allar sivilar sunnimuslimar, so skjótt teir hava kannað nøvn teirra, sigur ein kelda í irakska innanríkisráðnum við Reuters. Keldan leggur afturat, at tað hendir eisini javnan, at teir vápnaðu menninir taka seg inn í hús hjá sunnimuslimum og skjóta húsfólkið.

Sambært BBC hava minst 40 fólk latið lív á hendan hátt teir seinastu dagarnar, og fleiri kvinnur og børn eru teirra millum.

Sunnimuslimskar keldur siga fyri BBC og Reuters, at álopini eru helst hevd fyri bumbuálopið á eina shiamuslimska mosku í býarpartinum Jihard um vikuskiftið. Tað álopið kostaði tvey mannalív, og 19 vórðu særd.

Reuters skrivar, at teir vápnaði shiamuslimsku bólkarnir hava stongt fleiri vegir við brennandi bildekkum, og fólk hava fingið boð um atr halda seg innandura, tí vandi er fyri sunnimuslimskum hevndarálopum.

Amerikanska hervaldið sigur, at tað hevur sett tyrlur at fylfja gongdini, og at tíðindini um shiamuslimsk álop og morð verða kannað.

## STUTT SAGT

### Stórt trot á sjófólki

Tað stendur á hjá danska handilsflotanum at fáa nóg mikið av skiparum og stýrimonnum, og sambært felagnum Søfartens Ledere hendir tað meiri enn so, at reiðarar royna at yvirtala yvirmenn hjá øðrum reiðaríum at koma til sín ístaðin fyri.

Søren Hansen, sum er fakligur skrivari hjá Søfartens Ledere, sigur við Ritzau, at trotið á skiparum og stýrimonnum ger, at menn sleppa ikki at vera heims ta ásettu frítíðina, men noyðast umborð aftur fyrr enn ætlað. Aðrir noyðast at taka eitt tørn eyka, áðrenn teir sleppa heim.

Donsku handilsskipareiðaríini hava ongantíð havt so mong skip í gerð sum nú, og tí fer tørvurin á skiparum og stýrimonnum at veksa. Eitt nú fær A. P. Møller-Mærsk eitt nýtt skip um vikuna næsta ár, skrivar Ritzau.

### Kvinnur fáa grið

Í Pakistan hevur Pervez Musharaf, forseti, gjørt av at broyta tær muslimsku lógirnar, og tað ber millum annað í sær, at 1.300 kvinnur, sum sita í fongsli fyri ótrúskap og aðrar brotsgerðir, kunnu sleppa leysar ímóti loysigjaldi.

Eygleiðarar í Pakistan siga, at forsetin er djarvur. Hann hevur fyrr talað fyri at broyta tær muslimsku lógirnar. Eitt nú ætlaði hann eina ferð at broyta lógina um guðsspottan, men noyddist at taka uppskotið aftur, tí tað fekk sera harða mótstøðu frá víðgongdum kreftum, skrivar AP.

Verandi lóggáva sigur, at kvinnur, sum hava kynsligt samband uttan fyri hjúnalagið, kunnu steinast til deyða. Ein onnur lógargrein sigur, at kvinnur, sum drekka alkohol, kunnu revsast við 80 koyrlasløgum, og ein kvinna, sum verður tikin fyri stuldur, kann missa annann armin. Tað eru hesar revsingarnar, sum forsetin heldur vera ov harðar og ótíðarhóskandi, og sum hann nú ætlar sær at broyta.



*Pervez Musharaf – ein djarvur maður*

### Krokodilla tók smágentu

Leygarkvøldið tók ein saltvatnskrokodilla eina átta ára gamla smágentu út í eina á har norðuri í Avstralia, og síðani hevur eingin sæð nakað til gentuna.

Gentan var á veiðiferð saman við foreldrunum og øðrum, men tey fingu einki gjørt, tá krokodillan brádliga kom undan kavi og tók gentuna. Løgreglan sigur, at gentan var farin oman at ánni Blythe eftir vatni, tá krokodillan tók hana. Kavarar og servandir krokodilluveiðimenn vórðu alt fyri eitt sendir at leita, men teir funnu einki.

Tey seinnu árini eru saltvatnskrokodillurnar har norðuri í Avstralia øktar nógv í tali. Fyrst í sjeytiárunum var stovnurin so illa fyri, at krokodillurnar vórðu mettar sum eitt hótt djóraslag. Tá vóru bara nakrar hundrað eftir, men myndugleikarnir siga, at nú eru tær fleiri enn 10.000. Tað hevur eisini víst seg, at tær eru vorðnar meiri næskar tey seinastu árini, og í fjør drap ein saltvatnskrokodilla ein 55 ára gamlan mann nærhendis býnum Darwin.

Tær størstu avstralsku saltvatnskrokodillurnar eru um sjey metrar langar.